# ki altíð verið rættvísur

*n heldur ikki, at kritikkurin móti landsliðnum altíð hevur verið so r. Menningin hevur verið støðug, og Føroyar kunnu koma enn ldið verður fram við somu kós, heldur hann*

arnir altíð hava fingið ta viðurkenning, sum teir hava uppiborið fyri tað framúr arbeiði, sum teir hava gjørt. Ofta verður fokus flutt á tey skeivu tingini í spælinum, eins og fólk hava hug at síggja burtur frá, hvørjar fortreytirnar hjá føroyska landsliðnum eru. Her haldi eg, at føroysku miðlarnir ikki altíð hava havt nóg gott samband við veruleikan.

- Samstundis eru fleiri, sum koma við nøkrum heilt órealistiskum boðum um, hvussu tingini eiga at verða gjørd. Men tá tú so tosar við útlendskar venjarar, sum hava sæð okkara dystir - eitt nú Arsene Wenger og Brian Kerr - so halda hesir, at vit royna at spæla positivan fótbólt. Og so kann eg gott liva við, at tað eru nakrir av skrivandi miðlunum og okkurt lesarabræv, sum hevur eina aðra fatan.

Men alt hetta hongur kanska eisini saman við, at vit bara eru 48.000 fólk í hesum lítla samfelagnum?

- Ja. Tað er jú soleiðis, at øll kenna øll, og tað kann skapa eina rúgvu av tutli um ymisk mál. T.d. eisini málið um Toda. Eg hevði jú sagt, at eg skuldi hava Toda aftur á liðið, men tá hann endiliga var tøkur, so helt eg ikki, at hann var nóg væl fyri. Eg veit væl, at hann helt seg vera nóg væl fyri, men eg hevði eina aðra fatan.

- Men fyri meg var kjarnin í øllum tí málinum, at Todi kom aftur á landsliðið, og eg eri glaður um tað tíðina, sum eg kundi hava hann á landsliðnum. So fáa vit at síggja, um tað verður til meira landsliðsfótbólt hjá honum næsta ár, men eg lovaði at fáa hann aftur á landsliðið, og tað lyftið helt eg, sigur Henrik.

## Ættarliðsskifti

Eitt annað av lyftunum, sum Henrik gav á sinni, var at eitt ættarliðsskifti skuldi gerast á landsliðnum. Navnabrøvini hjá fleiri spælarum vóru snøgt sagt ov gomul, og tí roknaði hann við, at hetta fór at verða neyðugt.

- Tað hevur so gingið hampuliga skjótt eisini. Ikki bara tí nýggir mans hava trokað seg framat, men eisini tí fleiri av teimum royndu hava sagt stopp so hvørt. Tað hevur so givið fleiri ungum spælarum møguleikan, og eg haldi, at tað hevur eydnast væl at fáa teir inn á liðið. Men hyggur tú at liðnum, so er kortini ein bulur av spælarum, sum hava verið við allan vegin, og so hava vit nógvar aðrar, sum eru í landsliðsmyndini, uttan at vera heilt fastir. Tað haldi eg eisini vera rætti mátin, tí so hevur tú aloftast avloysaran klára, tann dagin tørvur er á honum.

- Og tað helt eg eisini, at dysturin í gjár prógvaði. Súni, Todi og Jákup vóru allir skaddir, og vit hava so eisini mist John Petersen og Pól Thorsteinsson hetta seinasta árið, og tað setir stór krøv til avloysararnar, tá so er.

## Haldið fram á leiðini

Tá tosið fellur inn á framtíðina hjá føroyskum fótbólti, so heldur Henrik, at tað fyrst og fremst ræður um at halda fram við arbeiðinum, sum er sett ígongd.

- Tað ræður um at spæla fótbólt og at læra at spæla fram eftir vøllinum. Sjálvandi skalt tú hava góðar verjuspælarar, men tú vinnur altso ikki ein dyst við at standa 90 minuttir í verjustøðu, fyri so at fáa ein einstakan kontramøguleika.

- Eg haldi eisini, at spælarunum hevur dámt at spælt upp á tann mátan, sum vit hava roynt. Vit hava skapt eina rúgvu av møguleikum í ymsu dystunum, og tað haldi eg vera positivt. Eisini hóast fleiri mál fóru ígjøgnum í hinum endanum.

Tosar tú við spælarar og fólk kring landsliðið, so sigst ein av stóru broytingunum vera, at tú hevur givið nógv størri frælsi til tann einstaka. Hevur hetta eisini nakað við menningina at gera?

- Mín fatan er bara so, at vit hava alla tíðina við menniskju at gera. Tú kanst ikki fara við hvørki spælarum ella øðrum sum smáar nikkudukkur, sum bara skulu siga ja og amen. Tvørtur ímóti, so haldi eg tað vera sunt, um vit kunnu diskutera nøkur ting, soleiðis at tú meira úr hvørjum einstøkum. Tú kanst jú ikki fara eins við øllum, so ein javnvág skal finnast. Og hana haldi eg, at vit hava funnið.

Og so leggur venjarin afturat, at hann eisini hevur lært nógv at vera føroysku landsliðsvenjari.

- Heilt avgjørt. Og serliga haldi eg, at spælararnir hava gjørt tað lætt at vera venjari. Teir hava ein framúr hugburð, og vit hava hvørja ferð havt nakrar fínar venjingar.

- Hartil havi eg so eisini havt Jógvan Martin, sum er ein framúr venjari, afturat mær. Hann kennir hvønn einstakan spælara væl, og er taktist væl fyri, so eisini hann hevur lært meg eina rúgvu. So alt í alt, so havi eg verið væl nøgdur, haldi eg.

At enda. Hvussu sær framtíðin hjá Henrik Larsen út, nú tú gevst sum føroysku landsliðsvenjari?

- Eg vóni sjálvandi, at eg verði venjari onkrastaðni. Akkurát hvar tað verður, dugi eg ikki at siga her og nú, men ætlanin er so, at eg skal halda fram í venjarayrkinum, staðfestir Henrik Larsen at enda.

Fróði um Henrik:

## Ein góður persónur

Fróði Benjaminsen. Fastur maður á føroyska miðvøllinum, og í nógvar miðvallardynamo'in í føroyska spælinum:

- Venjarar eru altíð ymiskir, men eg haldi Henrik hevur verið ein øgiliga góður persónur, tá tað ræður um samanhald í hópinum. Har var Allan Simonsen nógv meira bundin at reglum um, hvussu alt skuldi ganga fyri seg. Har hevur Henrik ikki gingið eins høgt upp í tað siðbundna.

- Sum spælari vilt tú heldur ikki hava, at alt skal vera so øgiliga strangt, og tí haldi eg, at hetta hevur verið ein øgiliga positivur eginleiki hjá Henrik.

- Og tað sama hevur verið galdandi á vøllinum. Her hava vit fingið nógv størri frælsi til at spæla, og tað haldi eg eisini hevur givið úrslit.

- So mín niðurstøða er heilt greitt, at Henrik hevur verið ein ógvuliga góður persónur at hava við at gera.

**-mørk**

# Jógvan Martin gevst sum hjálparvenjari

**Jógvan Martin Olsen staðfestir, at Henrik Larsen hevur ment eitt sera gott samanhald í føroysku landsliðsleguni. Nú tíðin er komin at skifta, hevur toftamaðurin ikki nøkur greið boð til eftirmannin, men hann heldur, at eitt U-21 landslið er fremsta fortreytin, um meira ferð skal setast á menningina av føroyskum fótbólti**

LANDSLIÐSPRÁT
*Jákup Mørk*

Hjálparmaðurin hjá Henrik Larsen hevur alla tíðina verið Jógvan Martin Olsen. Hann var eisini hjálparvenjari hjá Allani Simonsen í fleiri ár undan hesum, men tó leikluturin hjá Jógvan Martini á pappírinum hevur verið tann sami alla tíðina, so staðfestir hann alt fyri eitt, at tað hava verið tveir sera ymiskir venjarar at arbeiða saman við.

- Allan var øgiliga autoriterur, og hjá honum kom disciplin á liðnum í fyrstu røð, og har hevur Henrik verið heilt øðrvísi. Hann hevur lagt nógv størri dent á sosialu virðini á liðnum, og eg haldi eisini, at felagsskapurin á liðnum er vaksin nógv, síðani hann kom.

- Hann hevur ikki verið so neyvur við, akkurát nær hvíld og annað er á skránni, og eisini hevur hann tosað meira við einstøku spælararnar, har Allan kanska í størri mun tosaði til teir. Men eg haldi samstundis, at báðir hava verið sera góðir persónar at fingist við.

At síggja til, so tóktist tín leiklutur eisini at vaksa, tá Henrik varð settur. Er tað nakað, sum tú eisini hevur merkt soleiðis?

- Tað var eisini nakað, sum eg gjørdi greitt, at áðrenn samstarvið við Henrik byrjaði. Tú skalt hugsa um, at eg var øgiliga nýggjur í venjarastarvinum fyrstu árini undir Allan. Eg hevði í tvey ár roynt meg sum venjara hjá LÍF, og tað vóru so mínar royndir.

- Eftir fýra ár við Allan helt eg tó sjálvur, at eg hevði fingið nakrar royndir, og Henrik góðtók eisini alt fyri eitt, at vit báðir høvdu eitt greitt arbeiðsbýti.

## Heldur ikki fram sum hjálparvenjari

Frá spælarunum ljóðar, at ein tann fremsti eginleikin hjá Henrik hevur verið, at hann hevur givið spælarunum eitt nógv størri frælsi. Frælsi undir ábyrgd, sum eisini hevur ment einstøku spælararnar. Ert Jógvan Martin samdur í, at hetta hevur verið ein av lyklunum í menningini av liðnum?

- Tónin í landsliðsleguni hevur verið ein heilt annar hesa tíðina. Eg veit væl, at tapið í Sveis tók sera fast hjá Henrik, men tónin millum spælarar og leiðarar hevur alla tíðina verið ótrúliga góður, og tað hevur verið við til at framt eina stóra menning.

Nú hevur tú í átta ár verið hjálparvenjari. Er tað soleiðis, at tú nú gongur við einum lítlum landsliðsvenjara í búkinum?

- Tað havi eg sum so onga viðmerking til. Men eg haldi, at fólk eiga at skilja, at eftir so drúgva tíð sum hjálparvenjari, so havi eg ikki hug at halda fram í tí leiklutinum í øllum førum, slær Jógvan Martin fast.

At enda. Hvørjir lutir heldur tú vera teir týdningarmestu at fáa í rættlag, nú ein nýggjur landsliðsvenjari skal setast. Og hvussu kunnu vit á besta hátt menna føroyskan fótbólt framyvir?

- Har eru nógvir lutir, sum eg haldi eiga at verða viðgjørdir, soleiðis at perspektivið við landsliðsarbeiðinum verður greiðari.

- Tað ræður um at seta fokus á føroyskan fótbólt sum heild, og her er ein spurningur, um tað er nøktandi, at gloppið millum U-19 og A-landsliðið er somikið stórt. Um tíðin ikki er komin til at fáa eitt U-21 landslið, tí tað vildi hildið einstøku spælarunum í landsliðsskipanini nógv longri. Í dag kanst tú gott hava ein spælara, sum hevur eini 25 altjóða dystir fram til U-19 støði, men eftir hetta kunnu so ganga fleiri ár, har ongar slíkar uppgávur eru á skránni, og tað er alt ov long tíð. Gaman í hava vit sæð, at einstakir spælarar eru komnir blaðungir inn á A-landsliðið, men við einum U-21 landsliði rokni eg við, at vit høvdu sæð fleiri gjørt hetta lopið í einum ungum aldri.